

# Slepp undan óhappum

Ansa eftir vandunum og slepp undan óhappum við kemikalium heima við hús

# Slepp undan óhappum

Á hvørjum ári eru fleiri óhapp við kemikalium heima við hús, sum kundu verið fyribyrgd. Vandamerkið á fløskuni ella pakkanum sigur, hvussu vandamikið kemikaliið er. Um tú lesur henda faldara, skilur tú betur vandamerkini, og verður tí betur før/førur fyri at sleppa undan óhappum heima við hús.

Vit kenna tey reyðgulu vandamerkini. Hesi verða so við og við skift út við nýggj vandamerki, av tí at ES hevur samtykt nýggjar reglur fyri, hvussu kemikalii skulu flokkast, merkjast og pakkast. Hesar reglur byggja á eina altjóða skipan (Globally Harmonised System, GHS), sum við tíðini fer at fevna um allan heimin. Í hesum faldara verður kunnað um nýggju vandamerkini, og greitt verður frá um teir vandar, ið goyma seg aftan fyri merkini.

Upplýsingar um vandar við eini vøru eru at finna á vørulýsingini. Umframt tey nýggju vandamerkini eru eisini upplýsingar um, hvørjir vandarnir eru, og hvørjum ansast skal eftir, tá vøran verður brúkt. Vøran kann eisini vera merkt við "Ávaring" ella "Vandi", sum verður brúkt á teimum vandamestu vørunum.

Vandamerktar vørur skulu altíð goymast á einum tryggum stað, har børn ikki sleppa at. Slíkar vørur eiga heldur ikki at goymast saman við matvørum, djórafóðri, heilivági ella slíkum.

Kemikalii eiga ikki at verða stoytt í kloakkina uttan so, at evnið er ætlað til at reinsa frárensl. Burturbeining av innihaldi og íløtum skal fara fram í serligu skipanunum til vandamikið burturkast hjá IRF ella Tórshavnar kommunu. Merkingin av vøruni veitir upplýsingar um burturbeining.

**Fimm góð ráð**

- Lat altíð kemikalii vera í ílatinum, sum tey vórðu keypt í,
- Fylg leiðbeiningini á vørulýsingini,
- Fá ikki kemikalii á húðina, í eyguni ella niður í lunguni,
- Goym kemikalii fyri børnum,
- Hugsa um umhvørvið, áðrenn kemikalii verða burturbeind.





# Heilsuvandi

**Kemikalii, ið kunnu ørkymla húð og eygu, geva ovurviðkvæmi, skaða andaleiðina, elva til dølskni ella geva ørilsi.**

**Dømi**
Kálkloysari, WC-reinsievni, køliveska, nøkur sløg av límí.

**Góð ráð**
Alt eftir vandanum, verður mælt til at brúka verndarhandskar og verndarbrillur. Er vandi fyri skaða á andaleiðina, doyving ella ørilsi, skal evnið ikki andast í seg.

**Vandar**
Summi evni kunnu órógva andaleiðina, tá vit anda tey í okkum. Onnur innihalda organisk loysingarevni, sum eru doyvandi ella ørandi, um vit anda tey í okkum. Dampur kann vera rúsandi ella geva høvuðpínu. Evnini kunnu vera vandamikil ella geva vaml og ørkymla slímhinnur í munni og maga. Summi evni elva til ovurviðkvæmi, um tey koma at húðini, meðan onnur kunnu geva sviða og rodnan. Eisini kann svíða, um vit fáa tað í eyguni.

**Vandamerki, ið detta burtur**



Ertandi / Heilsuskaðiligt



# Etjandi

**Kemikalii, ið kunnu etja húðina, kunnu geva álvarsligar eygnaskaðar ella tæra metal.**

**Dømi**
Edikssýra, saltsýra, ammoniakk, evni at reinsa frárensl.

**Góð ráð**
Brúka verndarhandskar og verndarbrillur og anda ikki evnið í teg.

**Vandar**
Anda vit damp ella sirm í okkum, er tað etjandi í andaleiðini. Tað kann geva sviða í munni og hálsi, geva hosta, andaneyð, ilt fyri bróstið ella fáa ein at njósa. Svølgir tú evnið, kann tað etja munn, vælindi og maga. Hetta gevur pínu í munni, hálsi og maga, og trupulleikar at svølgja, og kann fáa teg at spýggja blóð. Evnið er etjandi fyri húðina og gevur brennandi pínu, roða, bløðrur og sár. Kemur evnið í eyguni, kann tað gera stóran skaða, pínu, táraflóð og krampar í eygnalokini. Vandi er fyri at fáa álvarsligan skaða í eyguni og at missa sjónina.

**Vandamerki, ið detta burtur**



Etjandi



Ertandi



# Eldfimt

**Eldfimur løgur og dampur, gass og sirm frá teimum og føst eldfim evni**

**Dømi**
Motorbrennievni, húsarhaldsspritt, evni at taka neglalakk burtur við, gassfløskur og spreydósir.

**Góð ráð**
Ikki roykja ella brúka opnan eld nærhendis hesum vørum. Koyr lokið væl á ílatið og goym tað kalt á einum staði við góðum luftskifti. Mælt verður til at brúka verndarhandskar og verndar-brillur um vandi er fyri at fáa evnið á húðina ella í eyguni.

**Vandar**
Evnini eru sera eldfim, og festir lættliga í tey, um tey koma nærhendis opnum eldi, neistum ella høgum hita. Úrslitið kann vera ógvusligur eldsbruni ella spreinging. Summi evni geva eldfim gass, tá vatn kemur at ella eldur kann kykna av sær sjálvum, um luft kemur at. Kemur eldur í, verður sløkt við pulvuri, skúmi, kolsýru, brunateppi ella vatntoku/sirmi. Spræn ikki vatn á, tí tað kann økja um eldsbrunan. Ber tað til uttan vanda, tak so evnið burtur úr økinum, sum er hótt av eldsbruna.

**Vandamerki, ið detta burtur**



Sera eldfimt / Ógvuliga eldfimt



# Umhvørvisvandi

**Kemikalii, ið dálka umhvørvið**

**Dømi**
Terpentin, bensin, plantueitur, skordýraeitur, máling, lakk og onkur sløg av límí.

**Góð ráð**
Lat ikki evnini út í umhvørvið. Koyr ikki í kloakkina uttan so, at tað er endamálið við vøruni. Burturbeining av innihaldi og íløtum skal fara fram í serligu skipanunum til vandamikið burturkast hjá IRF ella Tórshavnar kommunu.

**Vandar**
Hesi evni eru eitrandi fyri verur, ið liva í vatni (og á sjónum), og kunnu geva langtíðarárin í vøtnum og á sjónum.

**Vandamerki, ið detta burtur**



Umhvørvisskaðiligt



# Varandi heilsuvandi

**Kemikalii, ið geva varandi mein, eitt nú krabbamein, skaðar á ílegur og nøringarevni. Fevnir eisini um kemikalii/evni, ið elva til ovurviðkvæmi, lungnaskaða ella skaða á onnur gøgn, um vit anda tey í okkum.**

**Dømi**
Terpentin, bensin, tynnari, lampuolja.

**Góð ráð**
Ansa eftir ikki at anda evnini í teg. Brúka verndarhandskar og verndarbrillur, um vandi er fyri at fáa evnið á húðina ella í eyguni. Burturbeining av innihaldi og íløtum skal fara fram í serligu skipanunum til vandamikið burturkast hjá IRF ella Tórshavnar kommunu.

**Vandar**
Ovurviðkvæmi í andaleiðini ella andaneyð. Dampur kann geva høvuðpínu ella vera rúsandi. Um vit svølgja evnini, kunnu vit fáa vaml, umframt at tað kann skaða slímhinnurnar í maganum. Nøkur evni eru lívshættislig, um tey koma niður í andaleiðina, har tey kunnu geva kemiskan lungnabruna. Koma vit í samband við summi av hesum evnum, kann vandi vera fyri varandi meini, so sum krabbameini ella skaða á nøringarevnini.

**Vandamerki, ið detta burtur**



Eitrandi



Heilsuskaðiligt



# Eldnørandi

**Kemisk evni (gass, flótandi ella føst), ið kunnu elva  til ella nøra um eld í øðrum evnum ella tilfari.**

**Dømi**
Evni til sóttreinsan, bleikievni, súrevni ið verða brúkt í sambandi við andadráttartrupulleikar.

**Góð ráð**
Ikki roykja ella brúka opnan eld nærhendis hesum evnum. Evnini skulu goymast burtur frá evnum ella tilfari, ið brenna. Mælt verður til at brúka verndarhandskar og verndarbrillur, um vandi er fyri at fáa evnið á húðina ella í eyguni.

**Vandar**
Ikki øll eldnørandi evni brenna, men tey kunnu birta undir og nøra um eldsbruna. Kemur eldur í, verður sløkt við pulvuri, skúmi, kolsýru, brunateppi ella vatntoku/sirmi. Spræn ikki vatn á, tí tað kann økja um eldsbrunan. Ber tað til uttan vanda, tak so evnið burtur úr økinum, sum er hótt av eldsbruna.

**Vandamerki, ið detta burtur**



Eldnørandi



# Bráðeitrandi

**Kemikalii, ið eru bráðeitrandi, um vit fáa tey í okkum, á húðina ella anda tey í okkum. Evni við hesum vandamerki kunnu vera lívshættislig.**

**Dømi**
Týningarevni, plantu- og djóraeitur, træspritt.

**Góð ráð**
Fleiri av hesum evnum eru ikki vanlig í húsarhaldinum. Loyvi krevst ofta fyri at kunna keypa tey. Neyðugt kann vera við andingarverju, verndarhandskum, verndarbrillum og serligum arbeiðsbúna. Eitrandi evni skulu læsast inni. Burturbeining av innihaldi og íløtum skal fara fram í serligu skipanunum til vandamikið burturkast hjá IRF ella Tórshavnar kommunu.

**Vandar**
Hesi evni eru eitrandi, og tað kann vera lívshættisligt at fáa ella anda tey í seg ella at fáa tey á húðina.

**Vandamerki, ið detta burtur**



Sera eitrandi / Eitrandi



Heilsuskaðiligt



# Gass undir trýsti

**Gass í íløtum undir trýsti (hægri enn tvey bar)**

**Dømi**
Gassfløskur (LPG), sveisigass, súrevnisfløskur.

**Góð ráð**
Gass undir trýsti skal goymast á einum staði við góðum luftskifti, og ikki í sólini. Síggj til, at slangur og skoyti eru tøtt.

**Vandar**
Gev gætur, at gass undir trýsti kann fara í luftina, um tað verður ov heitt. Vørumerkingin á fløskuni sigur frá, hvør vandin er: um gassið er eldfimt, eldnørandi, eitrandi ella etjandi. Gassfløskur kunnu eisini innihalda kølt gass, ið kann geva frostsár.

**Eingi vandamerki hava áður verið fyri henda vanda**



# Spreingivandi

**Evni ella lutir, ið kunnu spreingjast**

**Dømi**
Nitroglycerin, spreingievni, fýrverk.

**Góð ráð**
Má haldast burtur frá hita, neistum og eldi, og royk ikki nærhendis hesum evnum. Mælt verður til at nýta verndarbrillur. Goymsla og burturbeining sambært landsins lóggávu.

**Vandar**
Spreinging við trýstbylgju/aldu; lutir verða slongdir burtur. Kann festa í aðrar lutir.

**Vandamerki, ið detta burtur**



Spreingivandi



# Fyrstahjálp

Les vørumerkingina fyri at fáa upplýsingar um fyrstuhjálp. Set teg í samband við lækna, um tú er illa fyri. Eisini ber til at fara inn á eina av heimasíðunum niðanfyri. Hav vørumerkingina hjá tær, tá tú søkir hjálp.

www.us.fo
www.giftlinjen.dk
www.helsedirektoratet.no/giftinfo
www.giftinformation.se

umhvørvisstovan www.us.fo

norden